# Horvna virðismetingin



**Tað finst eingin virðismeting, ið sigur, at prísurin var tann rætti, tá Torbjørn Jacobsen keypti partabrøv úr sínum egna partafelag fyri kurs 100 at kalla samstundis, sum tey annars vórðu virðismett til kurs 265. Tað nærmasta ein kemur virðismetingini kurs 100, er at Eik Banki eftir øllum at døma ikki vildi rinda Kongshavnar Útgerðarfelag reiðan pening til raksturin av rækjutrolaranum Napoleon við veðhaldi í partabrøvunum. Tað váttar Jóannes Eidesgaard, eftir at hava kannað Torbjørn Jacobsen**

KANNING
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Hví kundi privatpersónurin Torbjørn Jacobsen keypa partabrøv úr sínum egna partafelag fyri kurs 100, at kalla samstundis sum serfrøðingar virðismettu partabrøvini til kurs 265. Tá talan er um partabrøv áljóðandi eina millión krónur, sum í 2004 lógu inni í einum reiðarii við høvuðsaktivi í kreppuraktu rækjuvinnuni, er lætt at reisa spurningin, hvørt partabrøvini vórðu keypt úr felagnum fyri at bjarga tí, sum bjargast kundi. Um tey vórðu keypt fyri at avmarka fíggjarliga smeitin, sum Torbjørn Jacobsen og pápi hansara høvdu av at satsa sínar pengar í rækjuvinnuna. Um teir vistu, at partabrøvini í Atlantic Petroleum fóru at økjast í virði, og tískil kundu viga upp ímóti minkandi virðinum á Kongshavnar Útgerðarfelag, sum stóð til at missa rækjutrolaran Napoleon.

Ivin varð dúgliga sáddur av andstøðuni í løgtinginum fyri páskir, og sami ivi noyddi løgmann at seta sín nýútnevnda landsstýrismann í fiskivinnu- og tilfeingismálum á politisku vektskálina. Spurningurin var, um landsstýrismaðurin hevði eina fortíð við tí, sum á donskum nevnist "selskabstømning."

Politiski dómurin hjá løgmanni kom í gjár, og hann fríkennir Torbjørn Jacobsen. Í hvussu so er fyribils. Eftir stendur manglandi virðismetingin av partabrøvunum.

### Argumentið Eik

Í tíðindaskrivi 13. februar í ár skrivar Kongshavnar Útgerðarfelag, at felagið í 2004 kannaði møguleikan fyri at fáa til vega rakstrarpening við at seta í veð síni partabrøv í Atlantic Petroleum. Felagið hevði tørv á pengi til at reka Napoleon. Víðari skrivar felagið: "Tá tað ikki vísti seg at verða møguligt, helst tí bert fá høvdu álit á føroyska oljufelagnum um tað mundi, keyptu partaeigararnir Jóan Jacob Jacobsen og Tórbjørn Jacobsen hesi somu partabrøv í 2004 fyri áljóðandi virði kr. 1.000.000,00 og rindaðu peningin kontant inn í felagið, hetta fyri at útvega felagnum neyðugan likviditet."

Tað er staðfest, at eingin virðismeting bleiv gjørd av partabrøvunum, áðrenn tey vórðu seld úr partafelagnum Kongshavnar Útgerðarfelag til høvuðseigararnar. Grannskoðarastovan á Skála hevur góðkent roknskapin hjá felagnum fyri 2004, og hevur onga viðmerking til søluna. Sosialurin hevur fyrr í mánaðinum spurt Grannskoðarastovuna um, hví tey ikki hava biðið um nakra virðismeting og annars onga átekning hava í grannskoðaða og góðkenda roknskapinum. Men tey høvdu onga viðmerking.

Í uppritinum, sum Jóannes Eidesgaard byggir sína avgerð á, verður frágreiðingin frá reiðarínum góðtikin uttan viðmerkingar. Og løgmaður peikar ferð eftir ferð beinleiðis á Eik Banka, sum beinleiðis verju av landsstýrismanninum og hansara dispositiónum.

Spurningurin er tí, hvat Jóannes Eidesgaard og hansara serfrøðingabólkur vita um samskiftið millum Kongshavnar Útgerðarfelag og Eik Banka, tá reiðaríið sambært sær sjálvum vildi hava Eik at veðhalda fyri síni AP-partabrøv. Visti løgmaður til dømis, at Eik Banki ikki vildi hava partabrøvini?

- Tá tú spyr, hvar eg havi tað frá, so havi eg tað frá advokatinum hjá felagnum, sum er Bjørn á Heygum. Hann er partaeigari í felagnum, tað veit eg eisini, sigur Jóannes Eidesgaard.

Og løgmaður heldur síðani fram:

- Mín kanning er ikki ein dómarakanning. Eg má taka fyri fult, tað sum persónar siga við meg, serliga tá teir standa fram við sínum fakligu titlum sum advokatur ella grannskoðari og so víðari. Tað má eg byggja mína avgerð á. Og so leingi sum eg havi álit á tí, og so leingi sum eg ikki havi fingið tað øvugta at vita, so haldi eg meg trygt kunna byggja mína avgerð á tað.

*Tað vil siga, at tú hevur bara orðið hjá Torbjørn Jacobsen og advokati hansara Bjørn á Heygum, endurgivið í eini frágreiðing, sum Bjørn á Heygum sjálvur hevur skrivað?*

- Nei, tað er ikki heilt rætt. Mín serfrøðingabólkur hevur havt samrøður við onnur. Og tað, sum er sera týdningarmikið í hesum er at roknskapurin hjá Kongshavnar Útgerðarfelag er grannskoðaður, uttan at grannskoðarin hevur nakrar viðmerkingar til partabrævasøluna, sigur Jóannes Eidesgaard.

*Men hevur tú í frágreiðingini frá Bjørn á Heygum nakað prógv fyri, hvat Eik Banki svaraði Kongshavnar Útgerðarfelag?*

- Nei. Men eg havi tosað við Bjørn á Heygum seinnapartin í dag (hósdag, blm.), og havi frá honum fingið at vita, at teir hava fingið eitt munnligt avslag frá Eik Banka til umsóknina.

*Men tú hevur ikki biðið um nakað skrivligt prógv fyri hesum?*

- Nei also. Teir hava ikki fingið nakað skrivligt prógv. Teir hava fingið eitt munnligt svar frá Eik Banka, svarar løgmaður.

*Men átti tú ikki at kravt at fingið eitt skrivligt prógv?*

- Jamen, Eik fer ikki at útflýggja mær niðurstøður í málum við privatum viðskiftafólki hjá sær.

*Kundi tú ikki havt biðið Torbjørn Jacobsen ella Bjørn á Heygum um prógvið?*

- Jú, men also. Prógvið er ikki annað enn eitt munnligt svar, og svarið er eitt avslag, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Vit kravdu eingi skjalprógv

**Kanningarbólkurin kravdi einki skjalprógv frá Tórbjørn Jacobsen, hvørki um svar frá Eik Banka ella inngjald fyri partabrøvini til Kongshavnar Útgerðarfelag**

KANNING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hetta er eingin dómarakanning, og vit hava gjørt eitt fullgott kanningararbeiði út frá teimum fortreytum, ið fyrilógu.

Tað er tað stutta av tí langa, tá Sosialurin vil vita, um kanningarbólkurin hevur kravt nøkur skjalprógv fyri, á hvørjum grundarlagi Eik Banki noktaði fyri at taka pant í partabrøvunum hjá Kongshavnar Útgerðarfelag, og um peningurin reint faktiskt var goldin inn í felagið.

Bæði Jógvan Amonsson, grannskoðari, og Eyðfinn Jacobsen, advokatur, viðganga, at teir ikki bóðu Tórbjørn Jacobsen um skriftliga váttan fyri hesum.

Báðir vísa í staðin til roknskapin fyri 2004, sum er góðkendur uttan viðmerkingar av Grannskoðarastovuni á Skála. Men veruleikin er tann, at ein og hvør roknskapur í slíkum føri bara váttar eina sølu, men ikki, hvussu sølan er goldin. Og av tí at sølan varð framd við tí fyri eyga, at útvega felagnum reiðan pening, er tað ógvuliga týdningarmikið at staðfesta, at peningurin veruliga varð goldin inn í felagið, og at handilin ikki fór fram á annan hátt. Til dømis við mótrokningum.

Hetta eru heilt avgerandi spurningar, tí vórðu hesir spurningar skjalprógvaðir, lá bara eftir atfinningin um, at eingin uttanveltaður hevði virðismett partabrøvini – umframt tann ivi, sum altíð fer at verða tengdur at hesari søluni, nevniliga hvussu nógv ella lítið Tórbjørn Jacobsen visti um ásetta kursin, sum altso var almennur ein mánað eftir, at hann hevði keypt partabrøvini hjá Atlantic Petroleum úr Kongshavnar Útgerðarfelag til kurs pari. Og tað kann neyvan nakrantíð prógvast ella mótprógvast.

Sosialurin hevur spurt Eik Banka um málið, men bankin sigur seg ikki kunna gera viðmerkingar til einstøk mál.